**Nám X,**
**Eysturskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 9/2014: Uppskot til samtyktar um at hækka ferðafrádráttin til ung á øllum samferðsluøkjum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Ungdómstingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fram lógaruppskot um at hækka ferðafrádráttin ella á annan hátt lækka prísin til ung á øllum samferðsluøkjum.

**Viðmerkingar:**
Uppskotið snýr seg um at heita á landsstýrismannin í vinnumálum um at heita á feløg og stovnar – teirra millum Atlantsflog og Smyril Line – at hugsa ung inn í príspolitikk teirra.

Í hesum tíðum, har altjóðagerð gerst størri partur av samtíð teirra ungu, er alneyðugt, at eisini ung fáa høvi og møguleika at leita sær út í onnur lond.

Tí verður heitt á landsstýrsmannin um at betra um ferðamøguleikarnar hjá teim ungu, tí einki er at taka seg aftur í, at prísurin er týdningarmiklasta parametur fyri ung.

**Á Ungdómstingi, 10. februar 2014**

Jákup A. Henriksen Teitur J. Sigvardsen Petur S. Thomsen

Boas H. Heinesen Ronja Weihe Knútur Jóannesarson

Sveinur M. Nolsøe Vensil Djurhuus Fríði Slættalíð

Linda Fosaa